# Fiskimálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 4. mars 2019 |
| Mál nr.: | 19/00111-1 |
| Málsviðgjørt: | BL/KM |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um avhending av fiskidøgum í 2019

Við heimild í § 79, stk. 4 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um avhending av fiskidøgum millum fiskifør í bólki 2, 3, 4 A, 4 B og 4 T sambært § 74, stk. 1 í løgtingslógini, við loyvi fyri 2019, sum eru í fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi.

*Treyt fyri avhending*

**§ 2.** Eigarar av fiskiførum í bólki 2, 3, 4 A, 4 B og 4 T kunnu sínámillum í bólkinum avhenda fiskidagar fyri 2019.
*Stk. 2.* Loyvt er ikki at avhenda fiskidagar, ætlaðir til veiðu við húki, til veiðu við troli ella øvugt.
*Stk. 3.* Loyvt er ikki at avhenda fiskidagar til veiðu við húki frá fiskifari, ið er minni enn 110 tons, til fiskifar, størri enn 110 tons.
*Stk. 4.* Loyvt er ikki at avhenda fiskidagar til veiðu við troli frá fiskifari við framtøkumegi minni enn 500 HK til fiskifar við framtøkumegi 500 HK ella meira.
*Stk. 5.* Avhending er treytað av, at í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum, tíðarskeiðið 1. januar 2018 til 31. desember 2018, eru nýttir til fiskiskap við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifarinum.

**§ 3.** Fiskidagar kunnu, í tíðarskeiðinum 1. oktober til 31. desember 2019, avhendast millum bólkarnar sambært § 2. Tó er ikki loyvt at avhenda fiskidagar í bólki 4 A og bólki 4 B til bólk 4 T.

*Mannagongd*

**§ 4.** Tann, ið avhendar fiskidagar, skal lata Vørn skrivliga fráboðan, sum er váttað av báðum pørtum.
*Stk. 2.* Í fráboðanini skal vera upplýst nágreiniliga, hvussu nógvir fiskidagar verða avhendir frá upprunaliga rættindahavaranum.
*Stk. 3.* Áðrenn avhendaðu fiskidagarnir kunnu nýtast, skal Vørn við skrivligari

fráboðan til báðar partar hava staðfest, at tann, sum avhendar fiskidagar, hevur ræðið yvir so mongum fiskidøgum.

*Umrokning*

**§ 5.** Tá fiskidagar verða avhendir, sambært § 2, stk. 1 ella § 3, verður talið av fiskidøgum, ið verður avhendað, umroknað til fiskidagar samsvarandi skjali 1.
*Stk. 2.* Flokkingin av fiskiførum í fiskidagaskipanini í skjali 2 er grundað á málibrøv útskrivað av Skipaeftirlitinum fyri 1. mars 2005. Fiskifør kunnu ikki verða flokkað av nýggjum, eftir at henda áseting fær gildi.
*Stk. 3.* Fiskifør, ið hava broytt metingarvirði fyri fiskiorku, sambært reglunum um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri, kunnu tó flokkast av nýggjum, grundað á nýggj málibrøv útskrivað av Skipaeftirlitinum í sambandi við broytingina.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2019.

Fiskimálaráðið, xx mars 2019

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert

**Skjal 1**

## Umrokningarvirði í samband við avhending av fiskidøgum

**Talva, sí skjal 2**

**Leiðbeining:**

Í talvuni eru fiskifør í fiskidagaskipanini bólkað soleiðis:

*Partrolarar:* (Longd x breidd x dýpd) x HK/1000
*Trolbátar:* Maskinorka í kW
*Línuskip og útróðrarbátar:* Longd x breidd x dýpd

Tá fiskidagar verða umroknaðir millum fiskifør, verður fyrst hugt at teiginum longst vinstrumegin, fyri at finna tað skipið, sum avhendar fiskidagar. Skipið, sum flutt verður til, verður lisið av ovastu røðini. Fiskidagar, ætlanin er at flyta, verða síðani faldaðir við umrokningarvirðinum í talvuni.

**Dømi um nýtslu av talvuni:**

Ein útróðrarbátur (longd x breidd x dýpd = 190) avhendar 18 dagar til eitt línuskip (longd x breidd x dýpd = 682). Burtur úr hesum fær línuskipið 18 x 0,35 = 6 dagar.

Trolari I (LxBxD x HK/1000 = 970) avhendar 15 fiskidagar til trolara II (LxDxB x HK/1000 = 1650). Talan er um flyting av døgum úr bólkinum “Trolarar undir 1100” yvir í bólkin “Trolarar 1500 og størri.” Burtur úr hesum fær trolari II (15 x 0,71) = 11 fiskidagar.

**Skjal 2**

| | Trolarar 2000 og størri | Trolarar 1600 – 1999 | Trolarar undir 1600 | Trolbátar 300 kW og størri | Trolbátar minni enn 300 kW | Línuskip 600 og størri | Útr. bátar 300 - 599 | Útr. bátar 200 - 299 | Útr. bátar 120 - 199 | Útr. bátar undir 120 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Trolarar 2000 og størri | 1,00 | 1,17 | 1,40 | 1,56 | 1,87 | 1,40 | 2,33 | 3,11 | 4,00 | 5,60 |
| Trolarar 1600 – 1999 | 0,86 | 1,00 | 1,20 | 1,33 | 1,60 | 1,20 | 2,00 | 2,67 | 3,43 | 4,80 |
| Trolarar undir 1600 | 0,71 | 0,83 | 1,00 | 1,11 | 1,33 | 1,00 | 1,67 | 2,22 | 2,86 | 4,00 |
| Trolbátar 300 kW og størri | 0,64 | 0,75 | 0,90 | 1,00 | 1,20 | 0,90 | 1,50 | 2,00 | 2,57 | 3,60 |
| Trolbátar minni enn 300 kW | 0,54 | 0,63 | 0,75 | 0,83 | 1,00 | 0,75 | 1,25 | 1,67 | 2,14 | 3,00 |
| Línuskip 600 og størri | 0,71 | 0,83 | 1,00 | 1,11 | 1,33 | 1,00 | 1,67 | 2,22 | 2,86 | 4,00 |
| Útr. bátar 300 - 599 | 0,43 | 0,50 | 0,60 | 0,67 | 0,80 | 0,60 | 1,00 | 1,33 | 1,71 | 2,40 |
| Útr. bátar 200 - 299 | 0,32 | 0,38 | 0,45 | 0,50 | 0,60 | 0,45 | 0,75 | 1,00 | 1,29 | 1,80 |
| Útr. bátar 120 - 199 | 0,25 | 0,29 | 0,35 | 0,39 | 0,47 | 0,35 | 0,58 | 0,78 | 1,00 | 1,40 |
| Útr. bátar undir 120 | 0,18 | 0,21 | 0,25 | 0,28 | 0,33 | 0,25 | 0,42 | 0,56 | 0,71 | 1,00 |